# Ráðstevnan við ábiti

*Marknaðarátakið hjá Løgtingsins umboðsmanni*




Tað var Umboðsmaðurin sum, av sínum eintingum, skipaði fyri ráðstevnuni í Norðurlandahúsinum 6. mai 2011. Orsøkin sigst vera at stovnurin, Løgtingsins umboðsmaður, júst fylti 10 ár. Stovnurin byrjaði annars 1. mai 2001 og 10 ára dagurin var sostatt sunnudagin 1. mai 2011. Men, Umboðsmaðurin metti, at tað var óhóskandi at hava eitt tiltak ein sunnudag, tí almenn starvsfólk arbeiða ikki sunnudag. So tiltakið varð flutt til fríggjadagin 6. mai 2011.

Seinnapartur fríggjadag er eitt høgligt tíðspunkt hjá høvuðsstaðarelituni, at fara til almenn tiltøk, so sum móttøkur, fundir, ráðstevnur osfr., meðan tað arbeiðandi fólkið — ið skal gjalda fyri tiltøkini — ikki hava nakran møguleika at luttaka, tí tey skulu ferðast til Havnar og missa sostatt ein arbeiðsdag, samstundis sum tey skulu gjalda ferðaútreiðslurnar.

Løgtingsins umboðsmaður hevði eisini tikið hetta við í sínum útrokningum og hevði leiga Skálan í Norðurlandahúsinum sum tekur 260 fólk. Hetta passaði væl til talið á fólki sum vanliga gongur til ráðstevnur í Havn. Í hesum førinum vóru tey umleið 150, sigur Løgtingsins umboðsmaður.

Tað er kortini eitt sindur margháttligt at Umboðsmaðurin bjóðar til eina almenna ráðstevnu har tað bert er pláss fyri 260 fólkum, tí fólkatalið í Føroyum er hóast alt umleið 52.000. Men, tað er ikki tað einasta sum er marghattligt við hesari ráðstevnuni.

Eitt av evnunum á ráðstevnuni var: Hava vit brúk fyri einum umboðsmanni? Í hesari grein verður spurt: Hava vit brúk fyri einari ráðstevnu?

**Eitt lítið land**

"Føroyar eru eitt lítið land", er vanliga argumentið fyri at landsins fyrisiting og almennir facilitetir skulu liggja í Tórshavn. Men, tá skipast skal fyri hátíðarhaldi og ráðstevnum, verður ikki hugsa so nógv um hvussu fá tey eru sum skulu gjalda útreiðslurnar av marglætislívsstílinum hjá tí hægra sosiala klassanum.

## Kostnaður

### *Beinleiðis útreiðslur*

**ROKNING**

Frá: Løgtingsins umboðsmanni
Til: Tann einstaka borgaran

| Vøra/tænasta | DKK |
|---|---|
| Leiga av Norðurlandahúsinum | 6.150,- |
| Matur o.a. | 24.750,- |
| Fyrilestrahaldarar | 8.000,- |
| Ferðaútreiðslur | 7.720,- |
| Lýsingar | 3.258,- |
| Umseting | 2.200,- |
| Íalt | 52.078,- |




Kostnaðurin av matinum (ábitinum), ið varð etin á ráðstevnuni, svarar til tað sum teir 14 menninir á einum stállínuskipi hava at liva av í 18 dagar.[1]

### *Samlaði kostnaðurin*

| | | |
|---|---|---|
| Meðal ársløn hjá tí hægra sosiala klassanum (incl. eftrl. gj.) * | DKK | 562,000.00 |
| Løn fyri ein hálvan arbeiðsdag (við 233 arbeiðsdøgum í árinum) | DKK | 1,206.01 |
| Inntøkan hjá 140 vælbjargaðum fólkum á ráðstevnu í 1/2 dag | DKK | 168,841.20 |
| Rakstrargjald (húsaleiga, útbúnaður, viðlíkahald, trygging o.a.) ** | DKK | 29,547.21 |
| Rokningin frá Norðurlandahúsinum (sí omanfyri) | DKK | 52,078.00 |
| Samlaði kostnaðurin fyri 10 ára føðingardagin | DKK | 250,466.41 [2] |
| Kostnaðurin fyri hvønn einstakan føroying (52,000) | DKK | 4.82 |
| Um hvør dani (5.8 mió.) betalti kr. 4.82 fyri ein føðingardag | DKK | 27,936,638.26 [3] |

* Kelda: Fíggjarmálaráðið ** 140 tóm skrivstovupláss í 1/2 dag

Tað vóru umleið 150 fólk í føðingardegnum, men bert 140 fólk eru tikin við í hesum roknistykkinum, tí har vóru nøkur fólk sum ikki vóru á lønarlistanum hjá tí almenna, teirra millum var fyrrverandi Løgtingsins umboðsmaður Joen H. Andreassen.

“...”



**Gevið keisaranum tað, ið keisarans er…?**

Eitt er tó vist, vit hava sum heild ongantíð fingið so nógv fyri skattakrónurnar sum í dag, takkað verið eini samhaldsfastari samfelagsskipan. — *Jóan Pauli Joensen*

Ráðstevnan hjá Løgtingsins umboðsmanni er eitt ítøkiligt dømi um hvussu etableraður og inngrógvin stættarmunurin er í føroyska samfelagnum.

---

[1] Í øllum sáttmálum fer proviantur av óbýttum við kr. 95,55 pr. dag pr. mann. – *Sáttmáli millum Føroya Reiðarafelag og manningarfeløgini.*

[2] Samlaði kostnaðurin fyri føðingardagin (250 túsund kr.), svarar til 41 tons av feskum makreli.

[3] Kann tað hugsast at *Folketingets Ombudsmand* kundi funnið uppá at skipa fyri einum føðingardegi sum kostaði danska statskassanum umleið 28 mió. kr.. Hetta er eyðsæð ein reint hypotetiskur spurningur.

## Fikublaðið

Tvær vikur undan 10 ára degnum lýsir Løgtingsins umboðsmaður við einari almennari ráðstevnu. Onki var nevnt um endamálið við ráðstevnuni. Ráðstevnur hava vanliga eitt endamál, men hetta tiltakið hevði onki endamál. Ongin tíð var avsett til spurningar ella orðaskifti. Eiheldur var tiltakið í veruleikanum alment. Tvørturímóti, var hetta eitt marknaðarátak, ið samstundis stytti arbeiðsvikuna við einum hálvum degi.




Aftanfyri fikublaðið fjalir seg ein *exclusive* forsamling av samsintum fólki. Har vóru rósandi orð og skemt um tey 10 árini Umboðsmansstovnurin hevði virkað. Har var høvi at fáa eitt orð á Umboðsmannin, hitta nýggj fólk og gera nakað av *networking*.

### 🎉 RØÐUR, HUGNALØTA, ÁBIT O.A. 🎉

**13:05** Orðstýrarin (Løgtingsins umboðsmaður) bjóðar vælkomin.



**13:10** Hergeir Nielsen, løgtingsformaður setir ráðstevnuna



**13:30** Johnhard Klettheyggj, leiðandi løgfrøðingur
*Hvat hava vit rokkið hesi 10 árini*

**14:10** Steðgur



**14:40** Sjúrður Rasmussen, ráðgevi á Løgmansskrivstovuni
*Løgtingsumboðsmaðurin – frustratión ella inspiratión*



**15:20** Róbert R. Spano, professari við Háskóli Íslands
*Hava vit sum eitt lítið samfelag brúk fyri einum umboðsmanni?*

**16:00** Hugnaløta og ábit í forhøllini

### Í heimildarloysi

Tað er vert at minna lesarin á lógarásetta virkisøkið hjá Løgtingsins umboðsmanni, sum er at ansa eftir at almenna umsitingin ikki ger mistøk ella vanrøkir sínar skyldur og at almenna umsitingin ikki fremur órætt móti einstaka borgaranum.

Í starvssetanaravtaluni hjá Umboðsmanninum er onki sagt um at Umboðsmaðurin skal skipa fyri ráðstevnum/hugnaløtum og ábiti. Og tað er vituliga hvør sítt at hava eftirlit við umsitingini og so at borðreiða við mati og leskidrykki fyri somu umsiting — í arbeiðstíð.

### Fara aðrir eftirlitsmyndugleikar at gera tað sama?

Fara vit í framtíðini at síggja fiskiveiðieftirlitið, saman við veiðitjóvunum, ella politiið, saman við teirra kundum, í Norðurlandahúsinum á ráðstevnu at reypa um farnar tíðir?

### Eitt ógvusligt ábit

Tað er torført at ímynda sær eitt ábit sum kostar 24.750 kr., tað kann neyvan hava verið vanligur pinnamatur, ella *canapé*[4], sum tey kalla tað í Tórshavn. Kanska var tann brúsandi leskidrykkurin av tí dýra slagnum.




Neyvan kom ábitið frá Burger King í SMS. Tað er meira sannlíkt at tað vóru: *rækjur, laks og aðrar feitar sakir, borðið fylt við góðum kosti ….*

Tíðindablaðið Sosialurin hevði ein mann á ráðstevnuni hendan dagin. Vikuna eftir hevur hann eina opnu í blaðnum, men tað sær ikki út til at hann varnaðist nakað óvanligt.




Meðan stórbýarfólkini vóru á ráðstevnu, gekk lívið sum vanligt aðrastaðni í landinum. Fólk vóru til arbeiðis á sjógvi og landi, fyri sum frægast at halda búskapinum uppi.

---

[4] A small piece of bread or pastry with a savoury topping, served with drinks at receptions or formal parties.

## Ein samhaldsføst samfelagsskipan

Um so var at Føroyar vóru eitt samhaldsfast[5] samfelag, so átti tað at borið til at vent myndini soleiðis, at tað arbeiðandi fólkið hevði eins góðar møguleika at farið í Norðurlandahúsið á ráðstevnu, meðan landskassin betalir daglønina og ábitið o.a..



Mynd: Fríðhild Winther

Kanska fara vit í framtíðini at síggja hundratals flakakvinnur á ráðstevnu í Norðurlandahúsinum, at viðgera viðkomandi samfelagsviðurskiftir, so sum líkarætt til ókeypis at brúka Norðurlandahúsið og aðrar samfelagságóðar, við fullari løn frá tí almenna.



Mynd: Úr filminum Línumenn, hjá Zacharias Hammer

– ella nøkur stállínuskip sum hava brotið túrin av, so manningin kann taka sær av løttum á einari ráðstevnu í Havn – við fullari løn úr landskassanum. Eitt punkt á dagsskránni kundi t.d. verið: Nær fáa vit ein Umboðsmann sum eisini umboðar tann einstaka borgarin.

Higartil hava verkafólk ikki gjørt sær dalt av møguleikanum at leiga Norðurlandahúsið til ráðstevnur og senda rokningina í landskassan. Tað hevur helst nakað við siðvenju, dannilsi og samfelagsábyrgd at gera.

[5] Sum hevur samábyrgd og samstøðu við onnur [da. solidarisk]. – *FØ-FØ hjá Orðabókagrunninum*

## The self-serving culture

Tað er skjótt til at ein almennur stovnur, sum er óheftur og sum ongin hevur eftirlit við, fer at sætta sær og sínum av innløgum landsins.




"At umboðsmaðurin er óheftur av tinginum krevur eisini, at embætið hevur eina játtan til tað virksemið, sum skal vera. Tí um dagligi raksturin kemur í ta støðu, at hann kann vera tengdur at, hvørt eykajáttan kann fáast, so er embætið pr. definitión ikki longur óheft." – *Johnhard Klettheyggj*

Løgtingsins umboðsmaður hevði ikki biðið Løgtingið um eina eykajáttan til ráðstevnuna í Norðurlandahúsinum, men tók tær 52 túsund krónurnar beinleiðis av rakstrinum. Tað er tískil ivasamt um tað hjálpir at geva Umboðsmanninum eina størri játtan á fíggjarlógini, tá onki eftirlit er við hvat peningurin verður brúktir til.

Tað er ikki bert í Føroyum at almenn starvsfólk eru kend fyri at fáa sær sjálvum úr ríkiskassanum:

> "Why do you continue to work when you have two children working for the government?" Rosa told me this to exemplify *la mentalidad* (the mentality) that circulates among many people. If you have children working for the government they are able to pull strings in order to provide the things you need. And as government workers they are well positioned for getting their hands in the honey jar one way or the other.[6]



**Tey ríku skuldu vera lokomotivið í búskapinum**. Teirra nýtsla skuldu seyra niður gjøgnum samfelagið, so øll fingu ein bita av kakuni.

Vit fáa nú eina yvirstætt, sum tjenar nógv meira enn undirstættin. Eina yvirstætt sum í mongum førum sleppur undan at rinda til egna pensión - men kortini fær nógv hægri pensión enn undirstættin. Eina yvirstætt, hvørs børn fáa víðari ræsur og størri møguleikar enn børnini hjá undirstættini.

Sum Salomon, prædikarin, eisini sigur: "Óreiðiligur vinningur ger hin vísa til dára, og mutur spillir hjarta". — *Sjúrður Skaale*

[6] Grassroots Politics and Oil Culture in Venezuela_The Revolutionary Petro-State. – *Iselin Åsedotter Strønen*

### Óreiðiligur vinningur og mutur

Í framkomnum londum verður óreiðiligheit, ella svik, í tí almenna sektorinum viðgjørt sum øll onnur revsimál.



**White-collar crime** Crime committed by persons who, often by virtue of their occupations, exploit social, economic, or technological power for personal or corporate gain.

***Common characteristics*** Although white-collar crimes are quite varied, most have several characteristics in common:

- First, they involve the use of deceit and concealment, rather than the application of force or violence, for the illegitimate gain of money, property, or services.
- Next, white-collar crimes typically involve abuse of positions of trust and power. White-collar crime is also often more difficult to detect than other types of crime, in part because losses may not be immediately apparent to victims but also because the crimes can involve sophisticated schemes and cover-ups.

Fraud, the most common type of white-collar crime, involves obtaining money or services by making false representations or promises.

***Cost to society*** White-collar crime represents one of the fastest-growing types of crime in the world. Nearly every category of white-collar crime has increased in incidence in recent years. — *Laurie Levenson* (professor of law)

## Flashback

Meðan talararnir, á 10 ára føðingardegnum hjá Umboðmansstovninum, mintust aftur á góðar gamlar dagar, liggur umsóknin hjá tí einstaka borgaranum í einari skuffu á Almannaverkinum. Umsóknin hevði tá ligið á Almannaverkinum í 3 ár og 8 mánaðir. Starvsfólkini á Almannaverkinum kunnu prísa seg lukkuligan, at tað ikki var fiskur, sum lá í skuffuni og sevjan lak út á gólvið.




Fleiri av málsviðgerðunum í fyritíðarpensjónsmálinum nr. 2007-02/3867, vóru við í hátíðarhaldinum hjá Umboðsmanninum. Hesi fólkini høvdu ikki havt tíð ella orku at avgreiða fyritíðarpensjónsmálið, men tað var ongin trupulleiki at møta upp kl. 12:50 í Norðurlandahúsinum tann 6. mai 2011, sjálvt um innbjóðingin bert kom tvær vikur frammanundan.

### Virðingin fyri umboðsmansstovninum

Hugtakið virðing, varð fleiri ferð umrøtt á hátíðarhaldinum í Norðurlandahúsinum:

> Umboðsmaðurin er tingsins maður og sigast skal, at tingið hevur tikið hann til sín og hevur virðing fyri honum.[…] Jógvan Andreassen segði beinanvegin frá, hvussu leingi hann fór at sita, og á heysti 2004 varð so aftur farið undir at leita eftir tí næsta umboðsmanninum. Stovnurin hevði nú virkað á fjórða ári, og hevði fingið tann leiklut og ta virðing ein slíkur stovnur skuldi hava. — *Hergeir Nielsen*

> Virðingin fyri stovninum var alt fyri eitt til staðar, og væl var lagt til rættis hjá Jógvani hesa týdningarmiklu fyrstu tíðina. […] Sólja hevur drúgvar royndir innan líkari fyrisiting teirri hjá okkum og eisini teirri grønlendsku. Hon hevur eisini ta virðing og yrkiskunnleika, sum krevst til slíkt embæti. — *Sjúrður Rasmussen*

Tað er tó ein sannroynd at stovnurin, tey seinastu árini, er fallin í órøkt. Ikki bert er virðingin fallin munandi. Tað er eisini alt meira vanligt at fólk seta spurnartekn við niðurstøðurnar hjá Umboðsmanninum.

> Tað er ein roynd at fáa grundarlagið at ridla undir Løgtingsins umboðsmanni, tá niðurstøðurnar hjá Umboðsmanninum verða sendar til hoyringar, heldur enn at virða niðurstøðurnar og taka tær til eftirtektar. — *Páll á Reynatúgvu* (KvF 1. desember 2014)

Í sjálvum sær er tað ein falliterklering, at grundarlagið skal ridlar undir stovninum, bara tí at ivi er um eina niðurstøðu hjá Umboðsmanninum.

### Starvsfólkamál vs. arbeiðsfólkamál

> Eg havi ikki havt stundir til at greina út, hvørji málsøkið ikki hava verið fyri so gjøllum kanningum, veit bara, at nøkur eru uppprioriterað í mun til onnur, eitt nú, sum eg nevndi í áðni, starvsfólkamál og innlitismál. — *Sjúrður Rasmussen*

Tað er ikki álitisvekjandi at mál verða raðfest, alt eftir hvønn samfelagsbólk tey hoyra til.

Fyritíðarpensjónsmálið hjá tí einstaka borgaranum varð í byrjanini viðgjørt sum eitt arbeiðsfólkamál ið ikki hevði serliga stóran týdning og sum ikki hevði nakran skund.

Málið var sent Umboðsmanninum í juni 2014 og var afturkallað í apríl 2015, men í desember 2016, verður málið uppprioriterað til sama status sum eitt starvsfólkamál.




Tann 19. desember spyr tann einstaki borgarin um tað er ókey at almannakunngera brøvini frá umboðsmansstovninum. Alt fyri eitt verður málið flutt upp frá bólki 4: **Kann bíða** til bólk 1: **Hevur skund** og ein reaktión kom 52 tímar seinni, frá Umboðsmanninum sjálvum.

Tann einstaki borgarin (A) fekk játtaða eina fyritíðarpensjón tann 21. januar 2016, roknað frá tí degi søkt varð. A hevði umsíðir fingið sítt persónliga frælsi aftur og hevði ongan skund. Men, her var tað Umboðsmaðurin (H) ið hevði skund. Teldubrævið frá H var ein vónleys roynd at steðga almannakunngerðingini av skjølunum.

Í teldubrævinum verður m.a. sagt, at Umboðsmaðurin ikki kundi gera nakað við málið, tí Almannaverkið var ikki liðugt við viðgerðina. Áhugavert — fyri ikki at siga margháttligt.










Hetta málið fekk raðfestingina #1: ***Do first***. Í mun til málið hjá tí einstaka borgaranum, fekk hetta málið stóra og drúgva umtalu í høvuðsstaðarmiðlunum. Ikki minst í Kringvarpinum.

Í svarinum til klaguna frá John Rajani (17. juni 2016) skrivar sjálvur Løgtingsins umboðsmaður (21. juni) m.a.:

> […] fyri at eg kann taka eina klagu til viðgerðar, skal eitt mál vera liðugt viðgjørt, og ein endalig avgerð tikin. Eg havi ikki heimild at leggja uppí innihaldsligu viðgerðina av einum máli, sum ein myndugleiki ikki er liðugur at viðgera.

Meðan tað gingu fleiri ár inntil Umboðsmaðurin fortaldi tí einstaka borgaranum hvussu støðan var, so fekk klagarin í hesum málinum svar innan tveir arbeiðsdagar. Sambært Johnhardi Klettheyggj hava starvsfólkamál altíð verið hjartamál hjá Umboðsmanninum.



- Fleiri spennandi mál lógu eisini og bíðaðu okkum. Tað mest kontroversiella av hesum var helst setanin av nýggjum stjóra fyri Landsverkfrøðingsstovnin.
- Mær rennur í hesum sambandi serliga til hugs málið um setan av leiðara fyri frítíðarskúlan hjá Tvøroyar kommunu, har kommunan hevði vrakað ein pedagog og sett ein lærara í starvið, hóast dagstovnalógin greitt segði, at leiðarin skuldi vera pedagogur.
- Eitt annað mál, sum rennur mær til hugs, var málið um setan av umhvørvisleiðara fyri kommunalu brennistøðina í Tórshavn. Har var bert ein umsøkjari, sum leyk tey settu førleikakrøvini, men hon var ikki boðin til setanarsamrøðu.
- Mær kemur til serliga til hugs tvinnandi mál [*sic*]; ein starvssetan hjá ALS og 3 uppsagnir á Matrikulstovuni.

**Tað ræður um at rópar hart** — tí tað gevur úrslit

> Tað at klagað verður til løgtingsumboðsmannin er uppá ein ella annan hátt eitt útrykk fyri, at klagarin enn hevur eitt sindur av resursum. Tann púra hjálparleysi hevur ikki slíka orku og klagar tí ikki. Tað er, sum tá ið ambulansumaðurin kemur á skaðastaðið ikki altíð vest statt hjá tí, sum venar seg verst. Standurin er ofta uppaftur verri hjá tí, sum onki sigur. — *Sjúrður Rasmussen* (ráðgevi á Løgmansskrivstovuni)

**Ein stovnur fyri tey úrvaldu**

Upprunaliga endamálið við Løgtingsins umboðsmanni var at hava eftirlit við, at almenna umsitingin ikki fremur órætt móti einstaka borgaranum. Orðingin: einstaki borgarin, meinast við tey sum eru niðast í føðiketuni (*the plebs*[7]).



Í dag er høvuðsuppgávan hjá Løgtingsins umboðsmanni, at leggja uppí, tá tað eru samanbrestir millum almenn starvsfólk og almennar stovnar. Eisini ansar Umboðsmaðurin eftir at órættur ikki verður framdur móti teimum sum vilja sleppa inn í hitan hjá tí almenna.

Á ráðstevnuni í Norðurlandahúsinum síggja vit hvussu væl samansjóðaður Løgtingsins umboðsmaður er við miðfyrisitingina. Tey eru øll partur av tí hægra sosiala klassanum, ella sum Owen Jones kallar tað: *The Establishment.*

> **The Establishment** - *and how they get away with it*
> Powerful people associating together both professionally and socially helps cement existing bonds and a sense of solidarity.
> The modern Establishment relies on a mantra of 'There Is No Alternative': potential opposition is guarded against by enforcing disbelief in the idea that there is any other viable way of running society. — *Owen Jones*

Samhaldsfestið og solidariteturin, sum skal eitast at vera í føroyska samfelagnum, strekkir seg ikki longri enn til tey sum eru ovast í føðiketuni, við øðrum orðum: *The Establishment*.

Tað er stór endurnýtsla í tí hægra sosiala klassanum. Ein dag arbeiða tey á einum stovni ið fær átalu frá Løgtingsins umboðsmanni og dagin eftir arbeiða somu fólk hjá Umboðsmanninum. Tey fáa ongantíð sekkin fyri ódugnaskap, men vera flutt í ein annan skrivstovustól. Tað sum bindir hesi fólkini saman er sosiala samveran á fundum, skeiðum osfr..

> Skalt tú skipa fyri ráðstevnu, móttøku, fundi, konsert, sjónleiki ella øðrum tiltaki? Í Føroya heitasta húsi[8] eru sjey høli í ymsum støddum, skapum og møguleikum. Fá eitt prát við okkum um leigu og samstarv ella fá meira kunning á nlh.fo. — *Norðurlandahúsið*

[7] Ordinary people, especially those from the lower social classes.

[8] Tað hevði verið gott fyri samfelagið um Norðurlandahúsið varð flutt inn á Skálafjørðin. Tað hevði minkað um talið á ráðstevnu-misnýtarum, samstundis sum vanligi føroyingurin fekk ein kjans at njóta ágóðan av sínum egna arbeiði.

### Felags áhugamál

Í bókini *The Establishment - and how they get away with it*, sigur Owen Jones eisini nakað um mentalitetin hjá tí ráðandi elituni:

> Today's Establishment, in my view, is bound together by common economic interests and a shared set of mentalities: in particular a mentality that holds that those at the top deserve ever greater power and wealth.

### At miðsavna ella ikki at miðsavna

Umboðsmansstovnurin er eitt gott argument fyri desentralisering. Tað vísir seg nevniliga at vera búskaparliga oyðileggjandi at hava hendan eftirlitsstovnin staðsettan í nærheitini av teimum sum hann skal hava eftirlit við. Føroyar eru hóast alt 1.399 $km^2$, tað er tí ongin orsøk at kroysta meginpartin av almennu fyrisitingini — og eftirlitið — niður í 5,8 $km^2$.

Desentralisering hevði hjálpt til at skapt eitt meira fjølbroytt og javnt samfelag. Um nakrir almennir stovnar vóru fluttir til útjaðaran, høvdu teir samstundis fingið eitt betri innlit í hvaðani pengarnir í landskassanum koma frá. Tað hevði gagna øllum samfelagnum.

Eitt annað argument fyri at desentralisera, eru umberingarnar fyri ikki at desentralisera: a. Føroyar eru so lítlar og tað er torført og dýrt at flyta stovnar; b. Hesir stovnar hava altíð ligið í Havn, v.ø.o.: *don't rock the boat, please!*; c. Øll lond hava slíkar almennar stovnar í høvuðsstaðnum og d. (fyri at sitera Owen Jones einaferð afturat): *There is no alternative.*

## Sign of decadence and decline

Eitt tað fyrsta tekin um at ein stovnur er í afturgongd er *mission creep*[9], og ráðstevnan við ábiti er ein greið ábending um, at alt ikki ruggar rætt.

Trý ár seinni, í 2014, er støðan so ússalig at Umboðsmaðurin er farin at gera gjøldur burturúr tí einstaka borgaranum, við at seinka málinum í 10 mánaðir, uttan at fortelja borgaranum, ella Almannaverkinum, at Umboðsmaðurin ikki kundi viðgera málið.

### Smoke and mirrors

Sama ár sum ráðstevnan hevði verið, byrjaði arbeiðið at umkalfatra ársfrágreiðingina. Í fyrsta umfari er bert talan um eitt *facelift.*





Tær fyrstu myndirnar vóru í svart & hvítt. Men, nøkur ár seinni yvirtekur samskiftisfyritøkan Nudlavirkið marknaðarføringina av Umboðsmanninum. Tá fáa vit eisini litmyndir.

[9] The gradual addition of new tasks or activities to a project so that the original purpose or idea begins to be lost.

Nudlavirkið hevur givið ársfrágreiðingini hjá løgtingsins umboðsmanni nýtt snið. Við grafum og myndum, verður virksemið hjá umboðsmanninum, nú lýst á ein meira greiðan og nútíðarhóskandi hátt. Vit ynskja øllum lesarum góðan, greiðan og upplýsandi lestur.

Nudlavirkið er ein samskiftisfyritøka, ið veitir ráðgeving og loysnir innan marknaðarføring, lýsingar og sniðgávu. Drúgvar royndir – mest góðar – og gott innlit í dagsins miðlapallar, gera okkum før fyri at síggja klárt í einum heimi av talgildum ruðuleika, og tað allarbesta er, at tað kanst tú eisini.

Beinta á Torkilsheyggi er ein professionellur fotografur sum Nudlavirkið hevur leiga til at taka myndirnar til Ársfrágreiðing 2017 og her eru flestu myndirnar í litum.




Tað eru so nógvar myndir í Ársfrágreiðing 2017, at tað er ringt at halda stýr á teimum. Í kolofonini verður sagt at myndin av Miriam & Janus er á síðu 59, men síða 59 er ein av teimum fáu síðunum sum onga mynd hevur. Hetta hevur tó ongan týdning og ongin leggur tað til merkis.

## Meira stílur enn innihald

Blaðar tú gjøgnum ársfrágreiðingarnar síðan 2010, leggur tú skjótt til merkis at innihaldið er nógv broytt. Tað sum Løgtingið bað um, var eina frágreiðing um arbeiðið á stovninum. Tann frágreiðingin fyllir nú bert ein lítlan brotpart í ársfrágreiðingunum[10]. Restin er marknaðarføring av Løgtingsins umboðsmanni og starvsfólkunum á stovninum.

Nógv verður gjørt burturúr hagtølum í ársfrágreiðingunum, uttan at tað er greitt hvat allir hesir stabbar, lagkøkur og rokniørk skulu brúkast til. Í veruleikanum kunnu hagtølini ikki brúkast til nakað, tí tað er ikki altíð at tað er samsvar millum rokniarkið og veruleikan:




Tað er ikki óvanligt at stovnar, sum í longri tíð hava livað sítt egna lív, fara at sløsa við veruleikanum. Torført er eisini at gera nakað við tað, síðan tað ikki er loyvt at kritisera tað sum stovnurin tekst við, tí annars stendur embætið fyri hóttafalli, sambært Pálli á Reynatúgvu.

[10] Ein týðandi partur í vanligum ársfrágreiðingum er roknskapurin. Partaeigararnir eru ofta áhugaðir í at vita hvussu felagið/stovnurin hevur klára seg fíggjarliga. Ársfrágreiðingarnar hjá Umboðsmanninum hava ongan roknskap.

# Nestbuilding

Tá ein stjóri/leiðari í almenna geiranum hevur sitið somikið leingi, at hann kennir seg tryggan í stólinum og er farin at føla seg sum ein høvuðspartaeigara, er tað ikki ókent at hann fer undir at flyta gomul marknaskjøl. Hetta er ikki eitt serføroyskt fyribrigdi, men tað er kent aðrastaðni og verður rópt *mission creep,* sum nevnt í áðni.

Men, tað steðgar ikki har. Sum frálíður fáa trivnaður og umhvørvið størri týdning enn sjálvt arbeiðið á stovninum; tað ræður um at vera 'tíðarhóskandi' og at umhvørvið passar til stílin hjá leiðaranum. 'Stjórin skal seta síni fingramerkir á stovnin' sum tað eitur á føroyskum, ella *nestbuilding,* sum tað verður rópt aðrastaðni.



Create living environments that reflect you, support you and make you feel completely at home and healthy in your nest. – *Kate Bridger*

Kate Bridger heldur fram:



You will discover, and learn to embrace, who you really are and what you truly love.

Many of our Nest Building decisions and choices are not necessarily made on the basis of practicality or even aesthetics.

When it comes to Nest Building, emotion over logic is generally a good thing ... at least, once the practicalities have been taken care of. It is better to buy art emotionally than logically. It is better to feel at home than to merely occupy a building.

Nest Building reflects the confidence and contentment we feel in our relationships with ourselves, our mates and the rest of the world.

Nest building: *a guide to finding your inner interior designer*

Nógv er broytt síðan Umboðsmaðurin húsaðist í trongligu hølunum í Niels Finsensgøtu, fyri umleið 20 árum síðani. Dentur var lagdur á integritet og virðing fyri tí einstaka borgaranum. Ársfrágreiðingarnar vóru greiðar og innihaldið var í samsvar við tað sum Løgtingið bað um.

Í dag eru ársfrágreiðingarnar hjá Umboðsmanninum meira átøkar einum sølufremjandi bóklingi, heldur enn einari frágreiðing frá einum seriøsum myndugleika. Ivasamt er tó, um nakrar kosmetiskar ábøtur í ársfrágreiðingunum kunnu endurvinna álitið á stovnin.

# Tónalag og dannilsi




"Tú skalt lurta eftir, hvat mamma tín sigur, og lurta eftir tónalagnum á henni." – *Tummas* (7 ár)[11]

Brúkar Umboðsmaðurin sama tónalag, tá hann samskiftir við Almannaverkið, sum tá hann samskiftir við tann einstaka borgarin?

| | | | |
|---|---|---|---|
| **16** | I | 04.01.2015 | Klagarin spyr til málið. J.Nr: LUM-10-14/00035-13 |
| **17** | I | 03.02.2015 | Fyrispurning til málið frá Almannaverkinum |
| **18** | U | 05.02.2015 | Almannaverkið fær enn ein møguleiki fyri at viðmerkja |

Hetta er eitt brot úr málsyvirlitinum hjá Umboðsmanninum. Men, vit vita ikki hvat liggur í orðunum í akt 18: "Almannaverkið fær enn ein møguleiki fyri at viðmerkja"[12], tí tað svarar ikki spurningunum hjá Almannaverkinum í akt 17.

**Akt 17** Fyrispurning til málið frá Almannaverkinum:

> Sambært skrivi tykkara, dagfest 09.09.2014, skuldi Almannaverkið frætta aftur frá tykkum síðst í september mánað 2014 um omanfyri nevnda mál. Í hesum sambandi fer Almannaverkið at spyrja, um Løgtingsins umboðsmaður hevur tikið støðu í málinum, ella nær Almannaverkið kann vænta, at støða verður tikin í málinum.

**Akt 18** Mundi svarið frá Umboðsmanninum vera tað sama sum Umboðsmaðurin gav tí einstaka borgaranum, tá spurt varð um tað sama? … neyvan:

> Tygum eru altíð vælkomin at skriva ella senda viðmerkingar um málið til Umboðs-mannin. […] Av tí, at sera nógv mál eru til viðgerðar hjá umboðsmanninum, skulu vit boða tygum frá, at tað tíverri ikki hevur eydnast okkum at avgreiða mál tygara enn.

Hetta er bert eitt dømi um tann undirliggjandi klassamunin í føroyska samfelagnum. Tá til stykkis kemur snýr tað seg um dannilsi ella — sum vit síggja her — manglandi dannilsi.

> **Dannelsen i uddannelse** Dannelse skal være en uadskillelig del af fremtidens uddannelsessystem. Sådan er det ikke nødvendigvis i dag […]. Samfundets sammenhængskraft står for skud, hvis dannelse skilles fra uddannelse. Udviklingen af velfærdssamfundet hviler også på den enkeltes aktive deltagelse i fællesskabet - det er noget, der skal læres og dannes til. — *Lars Geer Hammershøj* (associate professor)

---

[11] Kavafonnin grætur um sítt kalda lær (Mark Levengood og Unni Lindell) Jákup í Skemmuni týddi.

[12] Løgtingsins umboðsmaður, ið annars er heitur talsmaður fyri opinleika og gjøgnumskygni, hevur higartil sýtt fyri at geva innlit í akt 18. Tað er tí ikki óhugsandi at svarið til Almannaverkið ikki tolir dagsins ljós.

# Eru Føroyar á hædd við onnur lond

*tá tað kemur til almennar tænastur?*

Tað er ikki rætt at generalisera, tí tað eru uttan iva fleiri sum fáa eina framúrskarandi tænastu frá tí almenna í Føroyum. Hetta eru almennar tænastur sum allir føroyingar hava betalt fyri. Øll eru tó ikki í sama báti tá tænasturnar verða veittar, tí tey sum sita á fremsta bonki, hava sum oftast etið køkuna, áðrenn onnur sleppa framat borðinum.

Public services are at the core of democratic societies founded on human rights, the rule of law and social solidarity. Public services provide equitable redistribution of wealth and in their delivery should ensure that people are treated with equal respect, provided equal protection, and live free of discrimination without regard to age, gender, religion, national identity, race or ethnicity, disability and sexual orientation.

— *Public Services International*

**Almannaverkið**

Tann einstaki borgarin hevði ongan sjálvsagdan rætt til eina fyritíðarpensjón, men hevði hann rætt til at fáa umsóknina viðgjørda?

Sambært løgfrøðinginum (málsviðgeri B) á Almannaverkinum, er svarið: nei. Fyrst gjørdi hann sær ómak av at halda málinum aftur í áravís. Síðani gav hann tí einstaka borgaranum skyldina fyri at málið ikki var avgreitt.

**Løgtingsins umboðsmaður**

Klagan hjá tí einstaka borgaranum var afturhildin hjá Løgtingsins umboðsmanni í 10 mánaðir. Og 20 mánaðir seinni sigur Umboðsmaðurin at hann kundi ikki viðgera klaguna tí Almannaverkið var ikki liðugt við viðgerðina.

> **Ombudsmanden skal være et værn for borgernes retssikkerhed** Ombudsmanden skal være *folkets* ombudsmand. En person, der er uafhængig af forvaltningen, og som enhver – både voksen og barn, borger og virksomhed – kan gå til, når hun eller han oplever at være blevet forkert behandlet af det offentlige. — *Niels Fenger* (Folketingets Ombudsmand)

# Eftirskrift

Komandi ár, leygardagin 1. mai, verður Umboðsmansstovnurin 20 ár. Tá verður helst ein ráðstevna í Norðurlandahúsinum við heitinum: "Hvat hava vit rokkið hesi 20 árini". Kanska verður tann einstaki borgarin biðin um at siga nøkur orð á ráðstevnuni. Livst, so spyrst.

Poul A Mikladal
á grundlógardegnum 2020
mikladal@yahoo.com